


– Tí, tá alt kom til alt vóru nógvar, sum lótu seg í ullintar troyggjur uttaná vøkru kjólarnar!

### Nýggj mótamentan

Við Joto kom ein nýggjur og fremmandur dámur til Havnar, og meðan konditaríið áður hevði verið einasta staðið at hitta aðrar teenagarar í, lá nú væl fyri at treffa vinkonurnar í Joto eisini. Dreingirnir høvdu ongan mótahandil, har teir kundu keypa hippan trýssaramóta, so teir bíløgdu Beatles outfittini og onnur hit frá Nyhavn 17, ella frá Carnaby Street í London.

At hava mótasýning var ikki heilt ókent í Havn, men tað var óvanligt at modellirnar og klæðini vóru til teenagarar. Joto hevði nakrar modellir, sum gingu mótasýning fyri handilin, og hesi tiltøk vóru ofta fyriskipað í samstarvi við frisørar.

– Sýningarnar vóru í ítróttarhøllini á Nabb, á Hotel Føroyum og eisini úti um landi, eitt nú í Klaksvík, og tær vóru akkurát líka so primitivar, sum tær vóru forkunnugar – og fólk streymaðu til, sigur Hanna, sum eisini vísir á, at við teenagarunum kom eisini kravið til nýtt make-up.

– Vit seldu vakurleikavørur til ungar kvinnur, so tað hevði stóran týdning at sleppa at umboða tey røttu merkini, so sum Revlon, Pierre Robert og Mary Quant, sigur Hanna og vísir á, at tú vart ikki veruliga við uppá mótan, fyrr enn tí átti eina Mary Quant lebastift ella eygnaskuggar. Hetta merkið var trendsetandi og ímyndaði rebelsku, loyndarfullu og sjálvstøðugu kvinnuna.

### Fyrsti stylisturin í Havn

Rólant Samuelsen, sum umframt at vera fastur kundi í Joto, eisini var dugnaligur frisørur, sminkørur og stylistur í Havn, starvaðist eitt tíðarskeið í handlinum.

– Tá vóru fólk nógv meira tolin enn tey eru í dag, tí har gekk Rólant í niðurringaðum flesablusum, platauskóm, reyðum lakkbuksum og eygnaskuggum, sigur Tordis, og Hanna sigur víðari:

– Óansæð hvat hann mælti kundunum til, so lurtaðu tær eftir honum. Eitt nú kundi hann finna uppá at siga ”nei, veitst tú hvat, hasa lebastiftina skuldi tú altso tikið og skift út, tí her er ein, sum stendur nógv betur til tína húð”, og so keypti daman eina nýggja lebastift. Og tær elskaðu tað, at hann feteraði tær og kom við góðum ráðum.

### Breyðskommin

Elisabeth Pike, sum býr í Canada, kom einaferð heim við skjáttuni fullari av hugskotum, eftir at hon hevði lært til dekoratør í Canada. Nú skuldi hon prýða vindeygað hjá Joto, og fór hon niðan til Frants og keypti ein hóp av sokallaðum Paskobreyðum, og eina rúgvu av appilsinum. Matin legði hon í vindeygað og so sløddi hon vørurnar hjá Joto millum breyði og appilsinirnar. Ongin hevði nakrantíð sær nakað líknandi og fólk vóru á gosi. Tey trunkaðu seg framman fyri vindeyganum, og trúgvandi fólk komu inn í handilin og lósu skriftstøð upp fyri teimum. Og Hanna minnist, at ein kona stóð og bankaði á vindeyga og græt og rópti upp um Jesus og breyðið, sum er heilagt og sum ikki er at spæla við.

– Eg hevði als ikki skonkt tí ein tanka, at onkur fór at taka tað illa upp, sigur Hanna.

### Gummiparadísi

Í trá við tankarnar um seksuella frígering gjørdi Hanna av at selja hítir til ungu kvinnurnar. Hon bílegði hítir í ymsum litum, setti pakkarnar á diskin og seldi til smædnar havnagentur. Og hesaferð vóru mótmælini so hørð og mong, at sjálvt mamma Honnu og Tordis frætti um standin niðri í handlinum. Hon, sum var ein siðilig eldri dama, gjørdi ikki mætari enn at fara heim í býin eftir syndafullu vørunum, og hon ripaði tær í kolkomfýrin heima í køkinum. Og fólk í grannalagnum undraðust á, at alt stinkaði av brendum gummi – ella preservativum, sum tær vórðu róptar tá. Markið varð rokkið, og fleiri hítir vórðu ikki seldar í Joto.

### Litaðar blæur

Brádliga skuldu allar genturnar í Havn hava litaðar blæur á høvdinum. Tá keypti Hanna niðurfyri av hvítum babyblæum, sum hon kókaði í alskyns Dylonlitum frá Málingahandlinum, og síðani seldi hon tær í Joto.

– Men tað var absolutt ikki líka mikið, hvønn lit tú brúkti, ella hvussu tú setti turriklæðið, tí tað var eitt signal um, hvør typa tú var, greiða tær frá.

Tí eisini blæumótin hevði sínar heilt serligu rammur, soleiðis at reyðsokkarnir høvdu illavorðnar lillavorðnar blæur, sum sótu stramt og aggressivt niður í pannuna, meðan fittu andaligu genturnar bundu turriklæði aftur í nakkan, sum ein koll, og so vóru tey ljósareyð.

– Aftaná blæurokið komu partisanturrikløðini, og nú skuldu allar ganga í slitnum tjóðveldistroyggjum og tuflustyvlum, og vóru ikki longur horur, men kommunistar, sigur Hanna at enda, við einum skálkabrosi.











*Rólant Samuelsen, sum umframt at vera fastur kundi í Joto, eisini var dugnaligur frisørur, sminkørur og stylistur í Havn, var tann fyrsti, sum keypti eitt Arabia stell, ið sæst her*



*Tær báðar, Anna Katrina Højgaard og Marjun Berg vóru modellir fyri Joto. Hesar myndirnar eru frá 1976 og tær báðar eru fyrst í tjúgunum*